# Jóannes vil gera okkum leigutrælir

**Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, nevndi í eini nýggjársgrein møguleikan at leggja búðstaðarskatt á føroyingar. Hetta fellur ikki í góða jørð hjá Jørgeni Niclasen, formanni í Fólkaflokkinum. Hann metir, at tað er púra burturvið, at skatta peningin oftari enn hann longu verður**

BÚSTAÐARSKATTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Sambært Jørgeni Niclasen vil Jóannes Eidesgaard syrgja fyri, at føroyingar ikki skulu kunna eiga nakað sum helst*

Sambært Jørgeni Niclasen er tað at pilka við stoltleikan hjá fólki, um mann tekur avgerð um bústaðarskatt til føroyingar.

- Tað hevur altíð verið ein stoltleiki hjá føroyingum at kunna seta føtur undir egið borð, tí er tað langt úti at byrja at skatta fólk fyri at eiga nakað. Peningurin, ið er nýttur at keypa hús fyri er longu skattaður, og hann verður aftur skattaður tá hann verður nýttur, so tað er púra burturvið at skatta peningin tríggjar ferðir, sigur formaðurin í Fólkaflokkinum. Hann greiðir víðari frá, at tann dagin, tað ikki loysir seg at eiga nakað, so verður mann eggjaður til at gerast leigutrælur, sum hann nevnir tað.

### Trygd í húsum

Jørgen Niclasen metir somuleiðis, at tað er ein ávís trygd í at eiga eini hús, tí um okkurt annað gongur galið, so hevur mann eina uppsparing í húsunum. Tí metir hann tað vera skeivt og eitt álop á føroysku fólkasálina, um fólk vera eggjaði til at leiga, heldur enn at eiga.

- Tað gevur onga meining at tvinga fólk at flyta fólk út úr sínum húsum. Fólk hava sjálvi goldið fyri tey og stríðst fyri at fáa tey, sigur formaðurin í Fólkaflokkinum. Hann leggur afturat, at tað ikki er neyðturviliga er samanhangur millum ogn og inntøku, og tí heldur hann tað vera skeivt, um fólk skulu gjalda fyri hús tey longu eiga. Somuleiðis metir hann bústaðarskatt hava eina óhepna avleiðing, ið hevur við sær, at fólk verða eggjaði til at sleppa síni ábyrgdarkenslu, um bústaðarskattur verður gjørdur á sama hátt sum í Danmark, har mann skal gjalda bústaðarskatt av tí mann eigur í húsunum.

### Ognarskattur tað næsta

Sambært Jørgeni Niclasen er hetta helst fyrsta stigið fram ímóti, at skatta fólk av øllum sínum ognum, og tað heldur hann als ikki bera til.

- Vit skulu ikki straffa fólk fyri at eiga. Tað er ein partur av fólkaflokshugsjónini, at fólk skulu hava møguleika at eiga sítt egna, og tí kunnu vit á ongan hátt góðtaka nakran ognarskatt, staðfestir Jørgen Niclasen.

### Ikki at javnseta fólk

Sambært greinini hjá Jóannesi Eidesgaard, har hann siterar búskaparráðið, skal bústaðarskatturin javnseta fólk, soleiðis at øll fáa betri møguleikar. Men hesum tekur Jørgen Niclasen als ikki undir við.

- Tað er longu skattur á arvi, og tað er ein skattur, har mann økir um ognina. Tí er tað í lagið at gjalda skatt av tí, men at gjalda skatt av nøkrum mann longu eigur, har mann ikki økir um ognina, ber als ikki til, sigur formaðurin í Fólkaflokkinum.

Hann metir somuleiðis, at mann ongastaðni er fegin um bústaðarskattin, og tí er onki hugskot at fáa sær hann her.

# Jørgen hevur misskilt alt

**Sambært Jóannesi Eidesgaard, veit Jørgen Niclasen als ikki hvat hann tosar um. Eisini er formaðurin í Javnaðarflokkinum harmur um viðgerðina, tíðargreinin hjá honum hevur fingið. – Kann mann ikki nevna nakað, uttan at verða lagdur undir at leggja eftir pensjónistunum, sum longu eru undantiknir í tankanum hjá búskaparráðnum, so er tað eitt álop á demokratiið, sigur Jóannes Eidesgaard**

BÚSTAÐARSKATTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidesgaard er harmur um viðgerðina hansara tíðargrein hevur fingið, tí tað er líkt til, at ongin veit, hvat teir tosa um*

Jóannes Eidesgaard er harmur um viðgerðina greinin hjá honum hevur fingið í fjølmiðlum og hjá politikarum.

- Eg skrivaði bara, at búskaparráðið hevur spælt við tankanum við eini umlegging av skattaskipanini, men nú er tað brádliga eg og javnaðarflokkurin, ið eru forsprákarar fyri at leggja ognarskattir á fólk. Tað er púra burturvið, og eitt álop á demokratiið, um vit ikki kunnu diskutera nakrar møguleikar, uttan at mann verður gjørdur til ein, sum loypir á pensjónistarnar, sigur formaðurin í Javnaðarflokkinum. Hann greiðir somuleiðis frá, at tað fellir honum fyri bróstið, at Fólkaflokkurin nú skal fara eftir Javnaðarflokkinum, og at fáa tað at síggja út sum, at Fólkaflokkurin skal vera betri ímóti pensjónistunum enn, hvat Javnaðarflokkurin er. Tí í tankanum frá búskaparráðnum eru pensjónistarnir nevndir sum undantak.

### Búskaparráðið ikki hoyrt

Jóannes Eidesgaard heldur tað vera løgið, at Jørgen Niclasen nú úttalar seg um bústaðarskattin, tí sambært formanninum í Javnaðarflokkinum, veit Jørgen Niclasen als ikki, hvat hann tosar um.

- Almennu Føroyar gjalda fyri eitt búskaparráð, men tað sær ikki út til, at nakar tímir at lurta eftir tí teir siga. Tí haldi eg tað vera harmiligt, at tá eg nevni nakað teir siga, so verður tað eitt persónligt álop ímóti mær. Tí eg havi onga støðu tikið um, hvørt vit skulu hava bústaðarskatt ella ikki. Eg veit ikki um Javnaðarflokkurin kann taka undir við bústaðarskatti. Men hetta er nakað vit mugu diskutera fyri at gera nakað við strukturella hallið í samfelagnum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Strukturella hallið í Føroyum er, at tað eitt miðalár ikki er javnvág millum inntøkur og útreiðslur.

### Bara eitt hugskot

Tá Jóannes Eidesgaard í tíðargrein síni í Sosialinum skrivaði um bústaðarskattin nevndi hann bert fyrimunirnar við honum, men hann dugir eisini at síggja stórar vansar.

- Mann hevur fyrr tosað eitt sindur um bústaðarskatt, og tá hevur tað verið soleiðis, at mann hevur funnið fram til, at tað kemur at kosta sera nógv í umsiting, tí bústaðarskattur, sum tey gera tað í Danmark, krevur eina virðismeting av hvørjum einstøkum húsi, og so er spurningurin, um mann nakrir pengar høvdu verið eftir, tá hendan meting var gjørd, metir Jóannes Eidesgaard.

### Skatta virðisøking

Í tankanum hjá búskaparráðnum er ætlanin, sambært Jóannesi Eidesgaard, ikki at skatta bústaðin, men virðisøkingina í bústaðnum. Tí vanliga fer ein virðisøking fram í einum húsum, og tí metir Jóannes Eidesgaard hendan skattin á saman hátt sum rentuskatt, har mann skattar av eini inntøku.

- Mann skal minnast til, at hetta ikki handlar um, at taka ognir frá fólki, men bara at skatta eina meirinntøku, greiðir Jóannes Eidesgaard frá, sum ikki vil koma inn á, hvat hendur, tá virðið í húsum minkar, tí so langt er ætlanin ikki komin enn.